# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sorgarleikur

Flogvanlukkan í Noregi er ein sorgarleikur, sum tað er sera torført at seta orð á. Vit vita øll, at vanlukkur henda innan flogferðslu, men vit vóna sjálvsagt, at vit og okkara flogfeløg verða spard fyri tað ræðuliga, sum ein flogvanlukka er. Flogvanlukkan hevur skelkað okkum øll, og allir føroyingar kenna djúpa sorg og samkenslu við teimum, sum hava verið fyri einum stórum missi. Hetta er ein veruligur sorgarleikur, sum fer at níva langt fram í tíðina. Vit kunnu bert vóna, at tað fer at eydnast hjá teimum, sum eru meinast rakt, at koma ígjøgnum sorgina og skelkin.

Fyri okkara flogfelag, Atlantic Airways, sum allir føroyingar eiga og eru stoltir av, er vanlukkan ein dyggur smeitur. Hjá einum flogfelag er trygdin alt, og einhvør vanlukka elvir til spurningar og iva hjá brúkarunum og starvsfólki. Enn vita vit als einki um orsøkina til sorgarleikin. Men øll vóna inniliga, at tað fer at eydnast hjá skaðanevndini við vissu at staðfesta orsøkina til vanlukkuna. Hetta hevur stóran týdning fyri álitið hjá brúkarunum og hjá starvsfólkinum til flogførini, og hetta hevur stóran týdning hjá teimum, sum eru meint rakt og skulu royna at koma til sættis við ta vanlagnu, sum hevur rakt tey. Øll skulu vit víðari við okkara lívi so ella so, tí vóna øll inniliga, at orsøkin til vanlukkuna kann verða staðfest við vissu.

Atlantic Airways hevur ment seg sera nógv, síðan felagið varð stovnað sum eitt alment partafelag. Felagið hevur prógvað, at vit føroyingar megna bert vit vilja. Føroyingar hava yvirhøvur verið sera góðir við felagið og hava givið felagnum sín dygga stuðul. Tá vanlukkan so rakar felagið, so kennist tað, sum vit øll verða rakt. Tað tykist, sum allir partar hava taklað vanlukkuna sera professionelt. Bjargingarmanning, løgregla og avvarandi myndugleikar í Noregi og starvsfólkið hjá Atlantic á vanlukkustaði og heima her í Føroyum. Øll hava gjørt sítt ítasta. Hetta er ein sera trupul støða og sum er alt annað enn løtt at takla. Tað tykist, tó sum allir partar hava livað upp til tað, sum væntast í eini slíkari sera truplari og sera álvarsamari støðu. Dagurin í gjár gjørdist ein sannur skaðadagur, tí seinnapartin hendi enn ein sorgarleikur við tað, at ein smádrongur druknaði á Langasandi. Vanlukkurnar hava ávirkað okkum øll og tær fara at ávirka okkum øll í langa tíð framyvir.

**Sosialurin**

## Tingfundir hoyrast og síggjast



KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin

**Til Formanskapin í Løgtinginum att: Edmund Joensen løgtingsformaður**

Føroyingar áttu at havt somu atgongd sum fólkið í grannalondunum, til at hoyra og síggja løgtingsfundirnar. Tað skuldi verið ein sjálvsagdur rættur, at borgarar landsins hava møguleikan at hoyra, hvat politisku flokkarnir og fólkavaldu umboðini hava at bera fram í Løgtinginum og at kunna fylgja við, hvussu Føroya land verður stýrt.

Nógvir føroyingar nýta møguleikan í dag at hyggja eftir Tingvarpinum, har tað ber til at síggja og hoyra teir fólkavaldu í "action". Vanliga byrja løgtingsfundirnir kl. 13.30. Tí fer tað at verða ógjørligt at fylgja við Tingvarpinum, um Kringvarpið fer at senda aðrar sendingar frá klokkan 15.00.

Útvarpið hevur viðhvørt sent á millumbylgju, tá okkurt serligt hevur verið á skránni td. orðaskifti um løgmansrøðuna og fíggjarlógina, men onki bendir á, at hetta verður loysnin.

Undirviðgerðini av fíggjarlógini setti framsøgumaður Sjálvstýrisfloksins spurningin, hvat tað vildi kosta, um sent bleiv beinleiðis frá tingfundum. Dýr útgerð, sum er keypt til ljóð og myndaupptøku finst í húsinum, og ivaleyst er tað bert ein spurningur um sendifrekvens. Um Kringvarpið ikki kann loysa hesa uppgávu, eigur Løgtingið at kanna møguleikan fyri at útbjóða uppgávuna at senda beinleiðis, so verandi og møguliga komandi luftbornir miðlar hava møguleikan at bjóða seg fram.

Nógv fleiri fólk enn ein skuldi trúð sita dagliga og fylgja orðaskiftinum, serliga eldri og tey sum ikki eru úti á arbeiðsmarknaðinum.

Eg havi fyrr víst á, at løgtingsfundirnir eiga at verða sendir beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi. Fari tí at reisa spurningin: "Hvat hendir, nú senditíðirnar í sjónvarpinum verða broyttar"?

Somuleiðis fari eg at heita á formanskapin um at virka fyri, at tingfundirnir í framtíðini kunnu hoyrast og síggjast.

## Regin Eikhólm og esperanto



JEFFREI HENRIKSEN

Í síni hvassorðaðu grein í mánadags-Sosialinum, har ið Regin Eikhólm finst at verandi føroyskari málrøkt, dregur hann millumtjóðamálið esperanto uppí við orðingini »eitt fremmandagerandi nýføroyskt esperanto hvørs hugflog og abstraktións niveau saman við brúkiligheit annars letur nógv eftir at ynskja.« Við tað, at henda orðingin bendir á tann vanliga fordómin og ókunnleikan um esperanto, skal her verða gjørt vart við, at

**1.** Í esperanto er hugflog og abstraktiónsniveau og »brúkligheit« á stak høgum stigi. Í esperantoheimi verður dúgliga kjakast og skrivað m. a. um vísindi, heimspeki, politikk og fíggjarmál; bøkur upprunaligar á esperanto eru týddar til ymisk tjóðmál.

**2.** Esperanto byggir á 16 grundreglur; 15. regla sigur, at øll »millumtjóðaorð« eru eisini esperantoorð.

**3.** Orðatilfarið nýtir vanligastu indo-evropisku orðrøturnar og er tí rættiliga lætt at skilja.

(E. s. Íslendskt hoyrir eisini upp í "indo-europæisku" málættina.)

Yvirlýsing

## EITT GOTT SAMFELAG – EITT SAMFELAG FYRI ØLL!

Starvsmannafelagið harmast um og øtast tær hendingar, ið bæði samkynd og fólk við øðrum húðaliti, hava verið fyri her heima. Hendingar, ið sýnist at vinda alsamt meiri uppá seg.

Sum samfelag og sum einstaklingur er tað skylda at vísa virðing og umsorgan fyri okkara næsta, hvør og hvar hann enn er, og eisini í verki vísa, at øll happing og niðurgerðing er í stríð við tað grundstøðið, vit byggja okkara samfelag á.

Starvsmannafelagið ásannar at tað er okkara skylda, sum ein solidariskur felagsskapur at stríðast móti hesum óhugnaliga rákinum, ið vit hava upplivað seinastu tíðina. Samstundis er tað ein politisk skylda at skapa fortreytir fyri, at hendan leiðin ikki fær gróðrarbotn.

Grundstøðið undir føroyska samfelagnum byggir á tolsemi, virðing og umsorgan fyri hvør øðrum, óansæð hvønn politiskan, trúarligan ella kynsligan livihátt vit hava.

Latum okkum í orði og verki vísa, at vit, sum tjóð, hava hetta sum aðalmál.

Latum okkum vera fyrimyndir fyri ættarliðið, ið veksur upp og komandi ættarliðum og læra tey, at vit hava eitt samfelag fyri øll. ØLL !

*Tórshavn 11.10.2006*
**Starvsmannafelagið**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.